DAGSINS MEINING

Syrgilig søga

Samanbrestirnir og syrgiligu hendingarnar í Ísrael, á Vestara Aarbakka og í Gaza hava nú í longri tí› hava skelka› heimin. Tú sær ikki sjónvarp, hoyrir ikki útvarp og lesur ikki blø› uttan at vera vitni til hetta syndarliga strí›, sum onga enda tykist fáa. Eina løtu er tú í parti vi› ósekum ísraelum, eina a›ra løtu vi› ósekum palestinum. Bæ›i hesi fólkini hava væl sama rætt til hetta søguliga landi› ella er ta› ikki so spyr tú teg sjálvan? Eftir Globus í SvF t‡skvøldi› stendur eftir ein ræ›umynd av einum borgarakríggi, sum tykist óloysiligt.

Vit í Føroyum og a›rasta›ni eru bert eyglei›arar til ta›, sum hendir í Ísrael. Vit uppliva hetta gjøgnum mi›larnar og gera okkara ni›urstø›ur út frá tí. Og hvat anna› kunnu vit! Tann, sum hevur vitja› í Ísrael, fær skjótt ta fatan, at ísraelar halda fjølmi›larnar eitt nú BBC vera í parti vi› palestinum. Teir geva eina subjektiva og ikki rættvísa mynd av stø›uni. Tá so er, og nettupp hesir mi›lar eru okkara nærum einasta forum fyri at fáa innlit í stø›una, so er ikki lætt hjá okkum. Spurningurin er so eisini, hví vit skulu gera okkara ni›urstø›ur. Lati› ísraelar og palestinar sjálvar taka sær av hesum vil onkur siga. Men solei›is er veruleikin jú ikki. Amerikanarar gera sína ni›urstø›ur, sum í stóran mun verja Ísrael, og onnur lond gera sína ni›urstø›ur, sum kanska verja palestinar.

Hvussu vit enn vilja skilja søguna, mugu vit bara sta›festa, at solei›is sum gongdin hevur veri›, hava bæ›i hesi fólk rætt til Heilaga landi›. Ta› ber rætt og slætt ikki til at nokta ø›rum teirra rætt til part av landinum. Alt anna› førir til kaos og anarki. Líka so burturvi› ta› er av palestinum at krevja einkarrættin til Jerusalem, líka so skeivt er ta› av ísraelum ikki at vi›urkenna rættin hjá palestinum til sítt land tvs. ein part av tí gamla Heilaga landinum. Her hava teir bú›, og her skulu teir eisini halda fram vi› at búgva - saman vi› ísraelum, vi› sí›una av teimum ella bæ›i tvey. Hetta er ta› fri›arprosessin leggur upp til, og hetta er ta› einasta rætta. Men ta› krevur av ísraelum, at teir eisini taka í egnan barm. Tí neyvan hava palestinsk foreldur lati› meira enn 200 av sínum synum og døtrum - í dey›an bert fyri at sita eftir vi› ongum.

Ta› ringasta, i› kann henda, er, um Ísrael fær einaví›gongda høgrastjórn. Ta› ver›ur ein vanlukka, tí tá slepst ongantí› burtur úr hevndarpolitikkin og sonnu jødafilosofiini um eyga› fyri eyga›. Tú loysir bert hetta syndarliga strí› vi› samrá›ing. Vi› at hóvlig og skilagó› fólk tosa um tingini. Men tá mugu partarnir eisini standa líka, og tí er umrá›andi, at Vesturheimurin stu›lar teimum ikki ví›gongdu kreftunum í Ísrael eins og í Palestina. Fáa vi›gongdir ísraelar og palestinar størri rásarúm ver›ur ongantí› fri›ur.

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI

Elsa Funding prestur á Vi›arei›i

Annan sunnudag í advent, 10. desember, ver›ur 42. presturin innsettur á Vi›arei›i. Ta› er Elsa Funding, sum tá ver›ur innsett.

Elsa Funding er, sum eftirnavni› bendir á, ætta› úr Funningi. Hon er fyrsti kvinnuligi prestur í Føroyum, og var hon prestvígd saman vi› biskupi, Hans Jacob Joensen, mi›skei›is í sjeytiárunum.

Hon byrja›i sum prestur í Hvalba, og har var› hon væl móttikin og væl l‡dd. Hon gavst í hesum starvi fyri umlei› 20 árum sí›ani.

Hon var eitt skifti avloysari sum prestur í Klaksvík, og hon hevur eisini lisi› nor›urlendskt mál á Fró›skaparsetrinum.

Eftir at Heri Joensen tók vi› sum sóknarprestur í Vesturkirkjuni í Havn, gjørdist Elsa Funding prestur í Vági, og røkti hon hetta starv í umlei› eitt ár. Sí›ani tá hevur hon veri› hjálparprestur hjá prósti í Tórshavnar Eystara prestagjaldi.

Elsa Funding ver›ur nú prestur vi› Nor›oya Eystara prestagjald. Hon hevur bústa› í Ónager›i á Vi›arei›i, og hon skal røkja kirkjurnar á Kirkju, í Hattarvík, í Svínoy, í Hvannasundi og á Vi›arei›i.

Sum nevnt hava 41 a›rir prestar veri› á Vi›arei›i. Teir seinastu minnast vit, eitt nú Meinhard Bjartalí› (1998), Erland Beder (1992), Jógvan Johansen (Frí›riksson) (1986), Henrik Fossing (1982), Salomon Joensen (1975), Niels Pauli Danielsen (1973), Kristian Osvald Viderø (1965), Jacob P. M. Magnussen (1957), Torkil Beder (1954), sum var tri›i føroyingur í starvinum. Hinir bá›ir vóru Jens Christian Evensen (pápi A. C. Evensen), sum var prestur á Vi›arei›i frá 1872-77) og Poul Østerø, sum var prestur frá 1800-1812. Fyrsti prestur á Vi›arei›i, sum vit vita um, var Schoutreæd Joensen, sum var prestur frá 1538-1549. Harra Jónas, sum var fyrsti ma›urin hjá Beintu (Barbu í Harra Pál) var prestur á Vi›arei›i frá 1688-1700.

Ein portørur leggur frá sær

Í gjár var seinasti arbei›slangari tí› sí›an avgjørt, at tá i› eg fylti 65, so skuldi eg gevast. Eg havi veri› gla›ur fyri starvi og nú nú gle›i eg meg til at gerast pensionistur, sigur Jógvan Hansen.

Jógvan b‡r í Kollafir›i. Hann er ætta›ur úr Lon í Mi›vági og flutti sum ungur til Havnar. Her møtti hann konuni, sum er ætta› úr Kollafir›i.

- Havnin er rættuliga eftir mær. Fyrst bygdu vit í Hoyvík, sum tá var ein uttanb‡ggjakommuna, men so leg›i hon saman vi› Havnini. Sí›an fluttu vit til Kollafjar›ar og nú hevur Havnin aftur tiki› okkum til sín, sigur hann skemtandi.

Jógvan heldur, at hann dugdi betri arbei›i sum ungur. Tá dugdi hann at sleppa landsjúkrahúsinum, tá hann hev›i fingi› frí. Men seinnu árini hevur hann hugsa› eins nógv um arbei›splássi› og tær hendingar hann hevur veri› fyri, tá hann er komin heim og ta› heldur hann hevur veri› stríggi›.

- Mín roynd er, at tú venir teg ongantí› til at vera portørur. Tú gerst ongantí› kaldur í fakinum og ta› eru tær mest dramatisku hendingarnar í arbei›inum, sum rættuliga skuggar yvir sólskinshendingarnar. Men ljós er eisini, serliga tá tú er eftir ungum fólki, sum liggja í einum knústum bili og tú sær, at tey hava fingi› lítlan ska›a, ella at tey hava møguleika fyri at koma seg aftur. Tá gerst ein gla›ur, sigur Jógvan Hansen.

Jógvan er ikki bangin fyri at hann fer at ke›a seg nú seinasta vaktin er tikin sum portørur. Barnabørnini og familjan t‡›a nógv og hann hevur nógv áhugamál.

- Eg eigi bát og mær dámar væl at flóta. Eg plagi at royna millum Stong og Eystnes og onkuntí› tá gott ve›ur er, so fari eg eystur um Nólsoynna, heilt su›ur á Kápilin. Eg plagi at royna á teim nor›aru lei›unum hjá havnamonnum, sigur Jógvan Hansen.

Spyrji› serfrø›ingarnar

Adressan:
Sosialurin,
box 76,
110 Tórshavn,

Fax 314720
ella teldupost:
spyr@sosialurin.fo

– og merki›, hvørjum tit seta spurningum.

Svarini ver›a prenta› í bla›num mikudag

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Sveinur Tróndarson sveinur@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta›
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

L‡singar

Freistir:	Tekst l‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Friggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Báturin, havi› og fólki›

Besti mátin at fáa fleiri ung at velja fiskivinnuna sum yrkislei› er, um tey sjálv koma í samband vi› fisk og fiskivinnuna sum heild. Ta› er t‡dningarmiki›, at tey ungu fáa kunnleika um fiskivinnuna á ungum aldri, og at hetta sambandi› ver›ur røkt. Hetta er høvu›sendamáli› í eini norskari verkætlan, sum nú væntandi ver›ur roynd í Føroyum

FISKIVINNA OG SKÚLI
Stefan í Skorini

Fyrilesturin var fyri innbodnum, og her kjakast nakrir teirra um framløguna

Mynd: Jens Kr. Vang

Í Noregi hava tey ásanna›, at ta› er ney›ugt at seta fiskivinnuna meira í mi›depilin. Ta› er tí›aravmarka›, hvussu leingi olja ver›ur í undirgrundini, og tí er ney›ugt at fáa fleiri ung at velja fiskivinnuna, tá tey eru li›ug í fólkaskúlanum.

Fiskivinnan fer at hava ein alt meira t‡›andi leiklut í norska búskapinum í framtí›ini. Eitt krav er tí, at lærd arbei›smegi ver›ur tøk til fiskivinnuna.

Arne Tunheim helt t‡sdagin fyrilestur á Hotel Hafnia fyri innbodnum gestum. Har greiddi hann frá sínari verkætlan í Noregi, og hvussu hon hev›i roynst har. Eftir fundin var semja millum føroysku luttakararnar um, at hetta eisini eigur at roynast í Føroyum. Ein bólkur var› settur, sum skal koma vi› einum uppleggi til eina verkætlan.

Fiskivinnan skal lokka

Í økinum kring Ålesund í Noregi hava skúlar og fakfeløgini í fiskivinnuni tiki› stig til eina verkætlan. Endamáli› er at gera fólkaskúlanængingar varugar vi› møguleikan at nema sær útbúgving í fiskivinnuni eftir lokna skúlagongd.

Hetta skal gerast vi› at møguleikarnar fyri útbúgving og arbei›i í fiskivinnuni vera meira sjónligar hjá næmingunum. Hetta skal vera vi› til at lokka fleiri av teimum at velja sær fiskivinnuna sum yrkislei›.

Verkætlanin sjálv brei›ir seg yvir seks ár. Frá 4. til 10. flokk. Tey, sum standa fyri verkætlanini, ásanna, at ta› er ikki nóg miki› bara at gera eitt sindur av reklamu, beint á›renn næmingarnir skulu velja sær eina útbúgving eftir at hava fingi› prógvi›.

Tí skulu næmingarnir hava samband vi› fiskivinnuna allatí›ina, me›an teir ganga í skúla.

Janus Jensen á fólkaskúladeildini í Undirvísingar- og mentamálast‡rinum var til fyrilesturin hjá Arna Tunheim, og hann heldur, at hetta avgjørt er ein gongd lei› í Føroyum, tí fiskivinnan er jú høvu›svinna okkara.

6 ára verkætlan

Verkætlanin er bygd solei›is upp, at næmingar luttaka í t‡ra størri verkætlanum. Lagt ver›ur til brots í 4. flokki og so ver›ur ein verkætlan á skránni anna› hvørt ár, til tey fara úr skúlanum eftir 10. flokk.

Me›an børnini ganga í 4. flokki, ættlei›ir ella adopterar flokkurin eitt ávíst fiskiskip, sum tey sí›ani hava samband vi› í eitt longri tí›arskei›. Á tímatalvuni er ein tími settur av um vikuna til verkætlanina. Tey fáa at vita, á hvørjari fiskilei› skipi› er, hvørjum fiskaslagi roynt ver›ur eftir, hvussu nógv teir hava fingi› í lastina. Anna›, sum er áhugavert at vita, er, hvussu ve›ri› er, og hvørjar hendingar eru at frætta um umbor›.

Í 6. flokki fara næmingarnir út vi› báti at fiska fyri at nema sær egnar royndir. Her skulu tey fáa nakrar royndir vi› fiski. Tey skulu brúka ta›, tey hava lært á skúlabeinki um at fiska.

Sí›ani skulu tey fara vi› bátinum at avrei›a og fylgja fiskinum, til hann liggur leskiligur á døgur›abor›inum. Henda verkætlanin skal taka umlei› tvær vikur.

Í 8. flokki skulu næmingarnir arbei›a vi› fiski og fiskivinnu sum tema. Tey skulu sí›ani velja sær ein part av vinnuni, sum tey leggja serligan dent á. Her ver›ur møguleiki hjá teimum at fara út á nøkur virki at kunna seg um teir bágar, sum eru í framlei›sluni.

Endabresturin í 10. flokki er ein fløga. Har skulu næmingarnir royna at gera eina áhugaverda l‡sing av fiskivinnuni í nærumhvørvinum á CD-ROM.

Væl móttikin

Henda verkætlanin hevur veri› væl móttikin í Noregi av næmingum, lærarum og vinnuni. Tí ver›ur hildi› fram vi› henni.

Stórur dentur ver›ur lagdur á, at næmingarnir ikki bara hoyra um fiskivinnu í flokshølunum, men eisini sleppa at royna naka› veruligt í vinnuni.

Verkætlanin hevur veri› í gongd í eitt ár í Noregi, og Arne Tunheim sigur seg hava sæ› eina broyting, vi› ta› at fleiri ung velja fiskivinnuna.

Janus Jensen heldur at vi› at seta hesa verkætlana í verk, kunnu vit í Føroyum minka um frástø›una millum skúlan og samfelagi›. Børnini vita ofta ov lítí› um, hvat gongur fyri seg í samfelagnum og vinnuni.

Vinnan er vi› til at fíggja

Talan er um eina royndarverkætlan, sum vinnan og skúlin hava tiki› stig til í felag. Vinnan, sum er fakfelagi› hjá fiskimonnum og rei›arum, geldur helvtina og skúlin hina helvtina av kostna›inum.

Solei›is arbei›a tey bæ›i fakfeløgini saman fyri at fáa eina fjølbroyttari arbei›smegi til fiskivinnuna. Umbo› fyri bæ›i Fiskimannafelagi› og Rei›arafelagi› vóru til fyrilesturin á Hafnia t‡sdagin, so hvør veit, um ikki eitt samstarv kann spyrjast burturúr.

Arne Tunheim er lei›ari fyri verkætlanini í Noregi, og hann er komin til Føroya at leggja okkum lag á at fáa eina líknandi verkætlan í gongd í Føroyum

Mynd: Jens Kr. Vang